Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jacob Vestergaard, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Kommunuvalið í Runavíkar kommunu

Spurningar:

1. Tá kommunuvalið í Runavíkar kommunu er ógildað, og avgerð er tikin um at hava umval, hvørjar heimildir hevur so sitandi býráð?

Viðmerkingar:
Líka síðan kommunuvalið fyri einum góðum ári síðan, hevur stór óvissa valdað um valúrslitið í Runavíkar kommunu.

Illgruni var um valsvik á valstaðnum í Oyndarfirði.

Málið varð meldað til løgregluna samstundis, sum at valið í Oyndarfirði varð kært til Runavíkar kommunu.

Úrslitið av valinum í Oyndarfirði broyttist frá uppteljingini valkvøldið til fínteljingina dagin eftir, og førdi hettar við sær broytingar í samlaða valúrslitinum.

Atkvøðuseðlarnir í Oyndarfirði vóru ikki koyrdir til Runavíkar fyrrenn dagin eftir, og høvdu verið goymdir í einum plastposa heima hjá valstýrisformanninum.

Runavíkar kommuna góðkendi valúrslitið, men avgerðin varð kærd til Løgmálaráðið.

Eftir drúgva viðgerð ógildaði Løgmálaráðið valúrslitið í Runavíkar kommunu.

Eftir Kommunuvallógini skal “gamla býráðið” verða sitandi, til umval hevur verið. Tað er ikki støðan í Runavíkar kommunu. Tí er neyðugt at fáa at vita, hvørjar heimildir sitandi býráð hevur.

Á Løgtingi, 20. januar 2026

Jacob Vestergaard